FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

19. desember 2023
Mál: 23/24591-4
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-056/2023

**Svar til spurning nr. 52-056/2023 frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, til Dennis Holm, landsstýrismann, um veðurfrøði á flogvøllinum**

**Spurningar:**

1. Er tað nøktandi, at altjóða flogvøllur sum Vága Floghavn, onga lokala veðurfrøði hevur?
2. Nær verður ein partur av Veðurstovu Føroya flutt vestur á flogvøllin?
3. Tekur landsstýrismaðurin undir við, at almenn arbeiðspláss verða kjølfest runt alt landið, har tað gevur meining?
4. Hevur landsstýrismaðurin heimild at staðseta veðurfrøðina á flogvøllinum?

**Svar:**

**Til nr. 1.**
Viðvíkjandi flogtrygd, so er tað í lagi, at eingin veðurfrøðingur er staðsettur vesturi á flogvøllinum. Tað er ikki óvanligt, at sjálvt væl størri flogvøllir enn Vága Floghavn ikki hava veðurfrøðing á staðnum. Ístaðin eru veðurfrøðingar, sum hava flogveðurvakt, vanliga staddir á sama stað og umsita fleiri flogvøllir.

**Til nr. 2.**
Síðani Veðurstova Føroya varð sett á stovn í 2021, hevur stovnurin verið í støðugari menning. Menningin av føroysku veðurheimasíðuni er komin væl áleiðis, og veðurtænastan er nú víðkað til eisini at fevna um allar gerandisdagar frá kl. 7-17, umframt at hava veðurforsagnir í Degi og Viku.

Við øktu játtanini í 2024, umframt eini umlegging og automatisering og samstarvi við vaktina á MRCC, verður møguligt at yvirtaka veðurtænastuna frá DMI, soleiðis at Veðurstova Føroya yvirtekur allar forsagnir fyri land og hav alt samdøgrið alt árið.

Tá hetta er komið á mál, verður miðað eftir at fáa starvsfólkini á Veðurstovuni umskúlaði til eisini at kunna átaka sær flogveðurtænastu, við tí endamáli at fáa stovnin góðkendan til at átaka sær flogveður, sí nærri lýsing í svari til spurning 4.

Tá Veðurstovan í framtíðini hevur fingið nøktandi umstøður og neyðugu góðkenningarnar til at kunna veita flogveðurtænstu, verður flogveðurfrøðingur á vakt staðsettur í Vága Floghavn.

**Til nr. 3.**
Landsstýrismaðurin heldur, at stóru íløgurnar í føroyska infrakervið og tað vælútbygda samskiftisnetið hevur økt somikið um flytførið hjá føroysku arbeiðsmegini, at staðsetingin av arbeiðsplássum í fleiri førum er óviðkomandi. Tó kunnu tað vera viðurskifti av serligum staðbundnum ella tænastuligum slagi, ið gera, at serlig fyrilit eiga at verða tikin fyri staðsetingini.

**Til nr. 4.**
Sum kunnugt hevur landsstýrið sett sær sum mál at yvirtaka loftferðsluøkið. Ein liður í hesum verður at menna eina altjóða góðkenda føroyska flogveðurtænastu.

Í dag verður flogveðrið í Danska Kongaríkinum umsitið av donskum myndugleikum, sum hava givið DMI einkarætt til uppgávuna. DMI hevur síðani útveitt uppgávuna til íslendskar myndugleikar at umsita.

Fyri at kunna bjóða seg fram at veita flogveðurtænastu, má veitingartrygd veitast fyri tænastuni. Hetta merkir, at ávíst tal av starvsfólkum verða skúlað til flogveður, og stovnurin annars verður góðkendur til uppgávuna av altjóða flogmyndugleikunum og Trafikstyrelsen.
Veðurstovan metir, at 5-7 fólk skulu setast í starv fyri at manna eina flogveðurtænastu alt samdøgrið.

**Dennis Holm**
*landsstýrismaður*